Poul Mohr fegnast:

# Ótrúliga gott fyri føroyskt skipasmíð

**– Eg ynski bæði Thor og Skipasmiðju góða eydnu og rós til fakfelag fyri tess støðu í sambandi við nýggjan skipasáttmála sigur fyrrverandi stjórin á Tórshavnar Skipasmiðju, Poul Moh**

SKIPASMÍÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað vóru kærkomin tíðindi at frætta úr Hósvík mánamorgunin, tá sáttmáli varð undirskrivaður millum Thor og Tórshavnar Skipasmiðju um bygging av einum stórum frálandaskipi fyri 75 mill. kr. Ein av teimum, sum fegnast um henda sáttmála, er fyrrverandi stjórin í Tórshavnar Skipasmiðju, Poul Mohr. Eitt av stóru ynskjunum hjá honum í mong ár hevur verið nettupp at fáa ein slíkan sáttmála. Nú hevur tað loksins eydnast soninum í stjórasessinum at fáa ein stóran sáttmála í hús.

– Eg ynski bæði Skipasmiðjuni og Thor alt tað besta og vóni, at hetta fer at hepnast. Tað hevur nógvan týdning fyri skipasmiðjuarbeiði í Føroyum sum heild, at slíkur sáttmáli verður gjørdur. Poul Mohr heldur tað eisini vera ótrúliga flott av fakfelagnum at hava givið hesum projektinum grønt ljós.

Var tað ikki hent, so var rætt og slætt eingin sáttmáli. Tá hevði skipið verið bygt aðrastaðni. Nú kunnu nógvir føroyskir handverkarar síggja fram til at vera við til at byggja eitt stásiligt far til eitt føroyskt reiðarí, og eydnast hetta væl, so vil hetta slóða fyri øðrum sáttmálum við.



*Poul Mohr, fyrrverandi stjóri á Tórshavnar skipasmiðju heldur sáttmála við Thor vera slóðbrótandi fyri f*

Ingeborg Vinther:

# Hatta fara vit aldrin at góðtaka

**– At útlendskir handverkarar nú koma til Føroya at arbeiða fyri undirløn, fer uttan iva at freista arbeiðsgevarar til at royna tað sama hjá okkum. Men tað fara vit aldrin at góðtaka, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta fer uttan iva at freista arbeiðsgevarar. Men tað kunnu teir gloyma alt um, tí hetta fara vit ongantíð at góðtaka.

Ingeborg Vinther sigur, at tað fer ongantíð at koma upp á tal, at útlendsk verkafólk skulu koma til Føroya at arbeiða fyri undirløn.

Nú um dagarnar frættist annars frá einum slóðbrótandi hending í føroyskari vinnulívssøgu: Thor í Hósvík skal byggja stórt skip á skipasmiðjuni á Skála. Men í tí sambandi skulu sveisarar úr Pólandi koma higar at gera skrokkin- fyri pólska løn, sum er nógv lægri enn føroysk løn.

Men hetta er einasti máti at fáa arbeiðið gjørt í Føroyum.

Hartil hevur tað verið ført fram, at tað, at sveisa skipsskrokkar, er útdeytt fak í Føroyum og tí verður sagt, at pólsku sveisararnir taka ikki arbeiðið frá nøkrum føroyingi. Tí góðtaka handverkarafeløgini støðuna.

Ingeborg Vinther hevur ongar viðmerkingar yvirhøvur til tað, sum handverkarafeløgini gera í hesum føri.

Kortini dylir hon ikki fyri, at eftir hennara tykki kann hetta kann kveikja tankan hjá fleiri arbeiðsgevarar um at royna tað sama, nevniliga at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroyar at arbeiða fyri løn, sum er galdandi í heimlandinum.

– Men tað fara vit aldrin at góðtaka, staðfestir Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tað sostatt hevði aldrin komið upp á tal, at tað varð góðtikið, at arbeiðsgevarar fingu útlendsk verkafólk at arbeiða fyri undirløn.

– Tað hevði máað støðið undan okkara sáttmálum og sostatt sett alt tað í vanda, sum verkafjøldin hevur stríðst fyri seinastu 80 árini. Og tað fara vit aldrin at góðtaka, sigur Ingeborg Vinther.

STARVSLÝSING

Vilt tú hava ávirkan á landsins byggilist?

Landsverk fær í næstum eitt nýtt málsøki og hevur tá bæði ný- og umbygging og viðlíkahald av landsins bygningum um hendi. Umframt vanliga byggiráðgeving skal eitt spildurnýtt arbeiðsøki á bygningadeildini hjá Landsverki nú skipast og mennast. Vit leita nú eftir tveimum virkisfýsnum og skapandi persónum við byggikønari bakgrund at byrja hjá okkum skjótast til ber.

Høvuðsarbeiðsøkið
Bæði størvini fevna um uppgávur innan høvuðsarbeiðsøkið hjá bygningadeildini so sum at vera við í arbeiðnum at greina og raðfesta krøvini til byggingina við atliti at funktionaliteti, estetikki og góðskustøði. Harumframt skulu okkara nýggju starvsfelagar eisini taka lut í viðgerð av øðrum málum, har bygging og bygningar, landslag og umhvørvi eru partar av viðgerðini. Røttu fólkunum kunnu vit bjóða spennandi og áhugaverd størv innan bygningsumsiting og byggiráðgeving.

Starvið innan bygningsumsiting
Saman við einum vælvirkandi toymi og starvsfeløgum við drúgvum royndum fert tú at hava ábyrgd av prosjektering av viðlíkahaldsarbeiði á landsins bygningar. Hetta inniber kravfesting, raðfesting, prosjektering og eftirlit.

Starvið innan byggiráðgeving
Við støði í tøttum samstarvi við Hjálpartólamiðstøðina skalt tú ráðgeva og standa fyri prosjektering, byggistýring og eftirliti við bygningsbroytingum í heimum hjá fólki við skerdum førleika. Í sambandi við studningsmál, skulu byggifrøðilig tilmæli gerast til miðfyrisitingina.

Førleikakrøv
Vit leita eftir fólki við byggikønari bakgrund – tvs. við útbúgving sum arkitektur, byggifrøðingur ella verkfrøðingur.

Vit vilja røkka best møguligum úrslitum og vænta vit tí, at tú ert arbeiðssamur, dugnaligur og væl skipaður.

Vit leggja stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, er ein arbeiðsglaður viðleikari við góðum samstarvsevnum og gevur títt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella:
Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

Og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august 2006. Merkið umsóknina "Umsókn til bygningadeildina" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast eftir 24. juli við at venda sær til Mayfinn Norðoy, deildarleiðara, á fartel. 540 871 ella mayfinn@lv.fo

sansir.fo

Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.

Landsverk, Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78, Tórshavn

Tel 340 800, Faks 340 801
lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
byggir land

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

